Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting:	02.12.2025
Mál nr.:	25/14176-21
Málsviðgjørt:	TVR/AJ-JAK
Ummælistíð:	03.10.25/03.11.25
Eftirkannað:	18.11.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.
(Flyta stuðulin til yrkisleiklist til Mentanargrunn Landsins, áseting um varalimir og aðrar smærri broytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg**
um
Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkispalllist og áhugapalllist"

2. Í § 1, stk. 1, § 4, stk. 3, § 8, stk. 1, 2. pkt. og § 10 verður "landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".

3. Í § 2, stk. 1, § 4, stk. 6 og § 13, stk. 1 verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

4. Sum yvirskrift yvir § 2 verður sett:

"*Palllistaráðið*"

5. Í § 2, stk. 1 verður "leiklistaráð" broytt til: "palllistaráð".

6. § 2, stk. 1, nr. 1-6 verður orðað soleiðis:
1) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Leikarafelag Føroya.
2) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Meginfelag áhugaleikara Føroya.
3) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya.
4) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Tórshavnar býráð.

5) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá starvsfólkunum á Tjóðpalli Føroya.
6) Tveir limir og tveir varalimir verða tilnevndir eftir avgerð landsstýrisfólksins, og verður annar teirra forfólk. Palllistaráðið velur næstforfólk."

7. Tvær staðni í § 2, stk. 2 verður "leiklistaráðnum" broytt til: palllistaráðnum".

8. Í § 2, stk. 2 verður aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Fær ráðslimur forfall, kemur varalimur í hansara stað."

9. Í § 3 og § 4, stk. 1-4 verður "Leiklistaráðið" broytt til: "Palllistaráðið".

10. Í § 4, stk. 3 verður "leiklistaligum" broytt til: "palllistaligum".

11. § 4, stk. 4 verður strikað.
Stk. 5 og 6 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

12. Í § 4, stk. 5, sum verður stk. 4, verður "leiklistaráðnum" broytt til: "palllistaráðnum".

13. Í § 4, stk. 6, sum verður stk. 5, verður "leiklistaráðsins" broytt til: "palllistaráðsins".

14. Í § 4, stk. 1 og 3 og í § 5, nr. 2 verður "leiklist" broytt til: "palllist".

15. Í § 5, nr. 4 verður "leiklistaligum" broytt til: "palllistaligum".

16. Í § 5, nr. 5 verður "yrkis- og áhugaleiklistina" broytt til: "yrkis- og áhugapalllistina".

17. Sum yvirskrift yvir § 9 verður sett:

"*Stuðul til áhugapalllist*"

18. § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrisfólkinum verður heimilað at veita stuðul til áhugapalllist."

19. Í § 9, stk. 3 verður "leiklistavirksemi" broytt til: "palllistavirksemi".

20. Í § 10 verður "áhugaleiklist" broytt til: "áhugapalllist".

21. Sum yvirskrift yvir § 11 verður sett:

"*Stuðul til yrkispalllist*"

22. § 11 verður orðað soleiðis:

"**§ 11.** Mentanargrunnur Landsins tekur avgerð um stuðul til yrkispalllist, sbr. stk. 2.
Stk. 2. At meta um umsóknir og at gera tilmæli til Mentanargrunn Landsins setir Mentanargrunnur Landsins tveir ráðgevar og tvey varafólk eftir tilmæli frá eini faknevnd fyri palllist, sbr. § 12.
Stk. 3. Ráðgevarnir og varafólk teirra skulu hava formligar førleikar og viðkomandi fakligar royndir til tess at meta um stuðulsumsóknir, og ráðgevarnir og varafólk teirra mugu ikki hava fíggjarlig ella persónlig áhugamál í umsóknunum. Varafólk kemur í staðin, um ráðgevi er ógegnigur ella fær forfall.
Stk. 4. Ráðgevar kunnu í mesta lagi sita í 2 ár á rað. Eftir 12 mánaðir skal ein nýggjur ráðgevi setast, soleiðis at somu ráðgevar í mesta lagi arbeiða saman í 12 mánaðir.
Stk. 5. Stuðul kann latast feløgum, bólkum og einstaklingum, ið reka yrkispalllistaligt virksemi, til leikrit, tónasmíð, leikstjórnan, framførslur, keyp av útbúnaði, verkætlanir, skeið, keyp av sakkønari hjálp og annað palllistavirksemi."

23. Sum yvirskrift yvir § 12 verður sett:

"*Faknevnd fyri palllist*"

24. § 12 verður orðað soleiðis**:**

"**§ 12.** Mentanargrunnur Landsins setir faknevndina fyri palllist eftir tilmæli frá Leikarafelag Føroya og Palllistafelag Føroya, ið mæla til hvør sín lim í faknevndina fyri palllist.

Stk. 2. Faknevndin fyri palllist eftirmetir hvørt umsóknarumfar saman við ráðgevunum og Mentanargrunni Landsins."

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Umsóknir um stuðul til yrkisleiklist fyri 2026, ið lýst varð eftir, áðrenn henda lóg kom í gildi, verða latnar Palllistaráðnum á Tjóðpalli Føroya, ið ger tilmæli til Mentanargrunn Landsins sambært áður galdandi reglum. Um neyðugt verður at fara undir fleiri stuðulsumfør í 2026, verður tað løgskipað eftir ásetingunum í hesi lóg.

§ 2

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Til tess at tryggja armslongd frá politisku skipanini verður skotið upp at umskipa leistin fyri stuðli til yrkisleiklist soleiðis, at tað frameftir verður Mentanargrunnur Landsins, sum eftir tilmæli frá nøkrum sakkønum ráðgevum fer at taka avgerðir um stuðul til yrkisleiklist. Mentanargrunnurin umsitur frammanundan eina rød av stuðulsskipanum. Seinast varð filmsstuðulin, ið fyrr lá hjá landsstýrisfólkinum, fluttur til Mentanargrunnin at umsita. Eins og filmsjáttanin skal stuðulin til yrkispalllist hava sína egnu stuðulsjáttan á fíggjarlógini, soleiðis at skilnaður er millum hesa játtan og aðrar játtanir, ið Mentanargrunnurin umsitur.

Við uppskotinum fær Leiklistaráðið, t.e. komandi Palllistaráðið, á Tjóðpallinum varafólk, og Palllistaráðið fær betri umstøður at hugsavna seg um virksemið á Tjóðpallinum saman við stjóranum. Tá skal orka ikki brúkast til at meta um verkætlanir hjá fríyrkisbólkum o.ø. og at gera tilmæli til landsstýrisfólkið, og armslongd verður samstundis tryggjað.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. er tað Leiklistaráðið á Tjóðpallinum, ið ger tilmæli til landsstýrisfólkið um stuðul til yrkisleiklist. Í Leiklistaráðnum sita tvey umboð fyri landsstýrið, eitt umboð fyri ávikavist Tórshavnar býráð, Leikarafelag Føroya, LISA, Meginfelag áhugaleikara Føroya og eitt starvsfólkaumboð fyri Tjóðpall Føroya. Stjórin á Tjóðpallinum er skrivari hjá Leiklistaráðnum.

Mentanargrunnur Landsins umsitur í løtuni stuðul til verkætlanir, útgávur, týðing, føroyskt framleitt tilfar til børn og ung, íverksetan, listafólkalønir, starvsløn og mentanarligt virksemi sum heild sambært kunngerð um Mentanargrunn Landsins. Harumframt umsitur Mentanargrunnur Landsins filmsstuðulin sambært kunngerð um film, ið er heimilað í løgtingslóg um stuðul til mentan og list v.m.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at tryggja armslongd og fakligar førleikar, tá ið stuðul skal latast til yrkisleiklist. Samstundis fær Palllistaráðið á Tjóðpallinum betri umstøður at hugsavna seg um virksemið á Tjóðpallinum saman við stjóranum.

Við hesum verður tí skotið upp, at Mentanargrunnur Landsins fer at umsita stuðulin til yrkisleiklist við at broyta løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Armslongdin til politiska myndugleikan verður tryggjað, soleiðis at tað í framtíðini verður Mentanargrunnur Landsins heldur enn landsstýrisfólkið, ið formliga tekur avgerð um stuðul til yrkisleiklist. Avgerðin verður grundað á eitt tilmæli frá nøkrum sakkønum ráðgevum, sum tryggjar, at umsóknir um stuðul til yrkispalllist bert verða viðgjørdar av faknevndum, ið eru settar til júst meting av umsóknum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er sent hesum pørtum til ummælis:

Tjóðpalli Føroya
Leiklistaráðnum
Leikarafelag Føroya
Palllistafelag Føroya
Listafólkasambandi Føroya
Meginfelag áhugaleikara Føroya
Mentanargrunni Landsins
Stjórnarráðunum

Hoyringarsvar er komið frá hesum:
Leiklistaráðnum
Leikarafelag Føroya
Palllistafelag Føroyar
Riu Tórgarð
Løgmansskrivstovuni
Umhvørvismálaráðnum
Heilsumálaráðnum

Løgmansskrivstovan, **Umhvørvismálaráðið** og **Heilsumálaráðið** hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

Leiklistaráðið

Leiklistaráðið fegnast yvirhøvur um, at landsstýrið raðfestir at dagføra og gera neyðugar broytingar í lógargrundarlagnum, at tillaga lógina og bøta um lógina.

Leiklistaráðið skjýtur upp at broyta heitið á lógini til at vera “Tjóðleikhús Føroya” í staðin fyri Tjóðpallur Føroya. Sagt verður, at arbeitt verður fram ímóti einum tjóðleikhúsi, og at eitt tjóðleikhús er ein av fremstu, um ikki fremsti mentanarberin í einum samfelagi og eigur ein

slíkur mentanarstovnur, hvørs uppgáva er at skapa karmar fyri samtalu í og uttan fyri stovnin, at verða tignað við heitinum Tjóðleikhús Føroya.

Í samsvari við ynskið um broyting til "Tjóðleikhús Føroya" mælir Leiklistaráðið til at broyta heitið á Leiklistaráðnum til: "Ráðið fyri Tjóðleikhús Føroya". Ráðið skal beinleiðis virka fyri og menna Tjóðleikhús Føroya, og sostatt er umráðandi, at heitið umboðar ráðsins fremstu uppgávu.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur, at Leiklistaráðið kann hava rætt í, at "Tjóðleikhús Føroya" er eitt gott og tignarligt heiti. Tó verður hildið, at ein møgulig broyting frá Tjóðpalli til "Tjóðleikhús" má gerast seinni, um tað verður hildið hóskandi. Í mun til ætlaðu broytingarnar at kalla leiklist fyri "palllist" hóskar heitið "Tjóðpallur" í roynd og veru sera væl. Tað er ein pallur, ið fevnir um eina rød av palllistagreinum. Tjóðpallur er eitt hugtak, sum snýr seg um ein ávísan pall, ikki eitt ávíst hús ella ein ávísan bygning. Tá Tjóðleikhúsið í framtíðini stendur klárt at brúka, verður pallurin í hesum húsi, og tá kann umhugsast at kalla bæði hús og pall fyri "Tjóðleikhús Føroya". Um hildið verður fast í breiðari hugtakið, er spurningurin um komandi tjóðleikhúsið í roynd og veru framvegis skal nevnast "Tjóðpallur Føroya", sum er eitt bæði fevnandi og sigandi heiti. Leggjast kann aftrat, at hóast heitið í lógini er "Tjóðpall Føroya", er einki í vegin fyri, at komandi húsið fer at eita "Tjóðleikhús Føroya".

Tikið verður ikki undir við at skifta heitið á Leiklistaráðnum til "Ráðið fyri Tjóðleikhús Føroya", sum so hevði skulað verið "Ráðið fyri Tjóðpall Føroya".

Ria Tórgarð hevur sum limur í Leiklistaráðnum sent sjálvstøðugar viðmerkingar til uppskotið (umvegis Leiklistaráðið). Hon er ímóti at broyta heitið frá yrkisleiklist til palllist. Hon skilir væl, at orðið palllist hevur eina breiðari merking og kann umfata aðrar listagreinar innan útinnandi listina á einum palli, t.d. dans, opera, sangleik og teaturkonsertir. Hon heldur tó ikki, at fakið, sum altíð hevur verið nevnt "leiklist" nú skal eita "palllist", tí tað er í leiklistini, at allar aðrar listagreinar sameinast. Hon sigur, at skrivaða orðið, visuella úttrykkið, tónleikur og ljóð, dansur, búnasniðgeving, maskusniðgeving, ljóssniðgeving og pallsniðgeving allar eru sjálvstøguðar listagreinar, ið koma inn í leikhúsið við sínum serligu førleikum. Men kjarnu-listagreinin í leikhúsinum vil og skal altíð vera leiklistin.

Harumframt heldur hon, at tað er vandi fyri, at játtanin til yrkisleiklist nú verður broytt, tí at vandi nú er fyri, at yrkisleiklistafólk, sum av fyrstan tíð stríddust fyri eini serstakari stuðulsjáttan til sjálvstøðugar leiklistaverkætlanir, nú verða skúgvað til viks av øðrum listagreinum. Hon sigur ikki, at aðrar listagreinar ikki skulu fáa stuðul, men av tí at fleiri av hesum hava aðrar stuðulsmøguleikar, er serstaka stuðulsjáttanin til yrkisleiklist einasta reina játtan til listagreinina leiklist.

Á sama hátt er Ria Tórgarð ikki samd í at broyta heitini í lógini til "yrkispalllist" og "áhugapalllist", eins og at Leiklistaráðið skal skifta navn til "Palllistaráðið".

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur, at fakið leiklist varðveitir sína tign og sína funktión, hóast tað verður javnsett við aðrar viðkomandi palllistagreinar undir meiri fevnandi heitinum "palllist".

Hildið verður ikki, at tað við broytingunum í heitunum fer at broyta játtanina ella umsitingina av játtanini. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026, sum er lagt fyri Løgtingið, hevur leiklistin

enn sína egnu rakstrarkonto og kann tí ikki koma í bland við aðrar stuðulsskipanir, hóast heitið verður broytt til yrkispalllist, og umsitingin latin Mentanargrunni Landsins at umsita.

Leikarafelag Føroya
Felagið innleiðir við at upplýsa um, at teaturlógir spegla listapolitikkin fyri palllistina, og at verandi tjóðpalslógin eisini ger tað. Felagið heldur, at broytingaruppskotið fær lógina at tódna heldur enn at menna hana.

Síðan viðger Leikarafelagið uppskotini til broytingar. Tað fyrsta er broyting av heitum. Felagið ger vart við, at tað heldur, at tað er neyðugt at allýsa fakligu hugtøkini og taka avleiðingarnar av broytingini í álvara. Tað er, at "yrkispalllist" verður allýst.

Sambært Leikarafelagnum er "áhugapalllist" ikki eitt fakligt hugtak, og tí mælir felagið frá at brúka orðið í lóggávuni. Leikarafelagið vísir á vanlig orð sum áhugaleikari, áhugadansari og áhugasangari, men til ber ikki at knýta áhugaleik saman við áhugaleiklist ella -palllist.

Leikarafelag Føroya heldur, at v.m., sum er strikað í heitinum á lógini í lógaruppskotinum, er av alstórum týdningi og ikki eigur at verða tikið úr lógini, uttan so at lógin fær heilt annað navn, eitt nú "Lóg um palllist" ella "Teaturlógin".

Leikarafelagið sigur, at ongi krøv verða sett til faknevndirnar, ið skulu meta um stuðul til yrkispalllist. Í minsta lagi eiga somu krøv at verða sett til faknevndirnar sum til ráðgevarnar, ið sita í tvey ár í senn. Felagið sigur, at um førleikakrav ikki verður sett til faknevndina, so kann talan ikki vera um armslongd, ið er tryggjað av fakligheit, og endamálið við lógarbroytingini verður sostatt ikki uppfylt.

Leikarafelagið sigur, at stjórnarráðið vil geva einum felagi, sum eitur Palllistafelagið, rættin til at tilmæla 50 prosent av faknevndini, ið eingi førleikakrøv eru til. Ein fortreyt fyri armslongd er fakligheit. Palllistafelagið hevur ikki skjalprógvað, at tað umboðar ein munandi skara av fólkum, sum antin eru yrkislærd við viðurkendari hægri útbúgving innan palllistagreinirnar ella hava átta ára samsvarandi royndir.

Tað er Leikarafelag Føroya, sum hevur samráðingarrættin fyri øll leikhústarvsfólk. Fyri at hava samráðingarrættin, so skal eitt felag hava í minsta lagi tveir triðingar av yrkisfólkunum í sínum limaskara. Tað hevur Leikarafelag Føroya. Tí er tað ikki rætt at lata 50 prosent av tilmælisrættinum til nakað annað felag. Leikarafelag Føroya er felagið fyri tey yrkisfólk og tað yrkisliga virksemi, sum hendan lógin umfatar.

Politiska skipanin eigur ikki at blanda seg upp í hetta og av sínum eintingum útvelja einstøk feløg fyri at geva teimum somu rættindi sum tað felagið, ið hevur bróðurpartin av fakfólkunum í sínum limaskara, nevniliga Leikarafelag Føroya.

Leikarafelagið mælir til, at ein orðing verður gjørd í lógaruppskotinum viðvíkjandi kærumøguleika. Felagið heldur, at listafólk skulu verjast av armslongd, og at tað er umráðandi við einum kærumøguleika.

Spurt verður, hví játtanin til Meginfelag Áhugaleikara Føroya ikki eisini verður løgd til Mentanargrunnin at umsita.

Viðv. Leiklistaráðnum tekur felagið undir við at áseta, at limirnir skulu hava varafólk.

Felagið undrast á, hvussu Leiklistaráðið fer at fáa munandi betri umstøður at hugsavna seg, tá stuðulsumsitingin verður løgd til Mentanargrunnin, tá talan bert er um 8-10 umsóknir árliga. Hildið verður ikki, at hetta eigur við í lógarbroytingina.

Tað krevur fakligan førleika innan palllist at verða stýrislimur í Leiklistaráðnum. Aftur og aftur siga fakfólkini hetta. Aftur og aftur verða sett stýri fyri leiklistina, har tað ikki eru fakfólk, og har forfólkið og aðrir stýrislimir ikki hava innlit í palllist. At flyta viðgerðina av umsóknum um stuðul til fríyrkisverkætlanir yvir í Mentanargrunnin loysir ikki hetta.

Leikarafelag Føroya heldur, at tað er neyðugt at skipa játtanina eftir einum leisti, ið samsvarar við nýggja heitið "palllist". Eitt nú við at gera serstakar puljur til ymisku palllistagreinarnar, so sum stuðul til yrkissjónleik, stuðul til musikkdramatik stuðul til dans. Hesar skulu skilgreinast og hava sína egnu játtan uttan at taka úr somu núverandi pulju.

Leikarafelagið heldur, at við hesum lógartekstinum er fakligheitin ikki tryggjað, og armslongdin sostatt ikki styrkt. Tvørturímóti, um hetta uppskotið fer ígjøgnum, so er eingin armslongd, og kærumøguleikin er burtur. Tað torir felagið ikki at viðmæla.

Leikarafelagið mælir til at fara undir eina vælskipaða, fakliga og sakliga tilgongd at tryggja Føroyum eina hóskandi teaturlóg, ið stuðlar upp undir eini menning av føroysku palllistini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið metir ikki, at tað er skilagott at gera eina úttømandi uppreksan av, hvat er palllist. Tað verður latið upp til sakkunnleikan, sum fer at gera tilmæli til Mentanargrunnin.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðgongur, at tað ikki er kannað, í hvussu stóran mun orðið "áhugaleiklist" hevur verið brúkt. Orðið stendur í bæði donsk-føroysku orðabókini hjá Sprotanum og hjá Orðabókagrunninum, har "amatørteater" verður týtt til "áhugaleiklist". Orðið áhugaleiklist stendur tó ikki sum leitorð úr føroyskum í eitt nú danskt.

Føroyska orðabókin sigur, at "leiklist" merkir "tað at leika sjónleik, sjónleikur sum listagrein".

Upplýsast kann, at Meginfelag áhugaleikara Føroya brúkar heitið "áhugaleiklist" um sítt virksemi.

Um "leiklist" verður broytt til "palllist", tykist tað tí natúrligt at brúka orðið "áhugapalllist í føroyskum høpi.

Orsøkin til, at styttingin v.m. er strikað í lógaruppskotinum er, at hildið verður, at tað sum lógin snýr seg um, er stovnin Tjóðpall Føroya, stuðul til yrkisleiklist og stuðul til áhugaleik. V.m. stendur tí nakað høpisleyst.

Í uppskotinum verður í serligu viðmerkingum til broyting nr. 24 viðmerkt, at broytingin er ein áseting um, at Mentanargrunnur Landsins skal seta faknevnd fyri palllist at meta um stuðul til yrkispalllist. Hetta er júst fyri at tryggja fakligan førleika í metingini. Sami leistur verður brúktur til filmsstuðulin. Faknevndin skal saman við Mentanargrunninum og ráðgevunum eftirmeta hvørt umsóknarumfar. Sambært § 11, stk. 3 í uppskotinum skulu ráðgevarar og varafólk teirra hava formligar førleikar og viðkomandi royndir til tess at meta um umsóknirnar.

Atfinningina frá Leikarafelag Føroya av, at Palllistafelag Føroya er annað av tilmælandi feløgunum, tekur stjórnarráðið ikki til eftirtektar. Óansæð hvør hevur flestar limir, og hvør hevur samráðingarrættin, so eru Leikarafelagið og Palllistafelag Føroya tvey virkin feløg á økinum, og hildið verður, at tað er gott at hava tvey ymisk feløg til at tilmæla limir í faknevndina fyri palllist. Sum dømi kann nevnast, at hvørki Føroysk Filmsfólk ella Filmshúsið hava samráðingarrætt, men kortini skjóta tey limir upp í faknevndina fyri film.

Játtanin til MáF er ein stuðulsjáttan, ið lutvís fer til at reka skrivstovu og lutvís sum stuðul til áhugafeløgini. Armslongd er longu til politisku skipanina, og ætlanin er ikki at gera broytingar viðv. hesi umsiting.

Uttanríkis- og mentamálaráðið metir, at Leiklistaráðið fer at fáa munandi betri umstøður at hugsavna seg um stýrisleiklutin, tá ið stuðulsumsitingin verður løgd til Mentanargrunnin. Hóast talið á umsóknum vanliga er umleið 8-10 um árið, tekur tað nógva tíð hjá fólki, ið hava sessin í Leiklistaráðnum sum eitt hjástarv, at lesa og viðgera umsóknir, kalla limirnar saman til fundar, skriva grundgevingar, fundarfrágreiðingar og til tíðir at lýsa eyka umfør, at viðgera innkomnar klagur og ofta eisini at skula svara eyka spurningum frá stjórnarráðnum.

Leikarafelagið hevur fleiri viðmerkingar um fakligu førleikarnar í Leiklistaráðnum og um tilverurættin hjá Palllistafelag Føroya. Hetta verður ikki viðgjørt í hesum uppskoti. Tað sama er galdandi fyri starvsfólkaumboðið.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur, at sjónarmiðið um at skipa játtanina í puljur til ymisku palllistagreinarnar kann verða tikið upp í nevndini fyri Mentanargrunnin.

Uttanríkis- og mentamálaráðið ger vart við, at endamálið við lógaruppskotinum í høvuðsheitum er at flyta umsitingina av stuðlinum til yrkisleiklist til Mentanargrunn Landsins, og hvussu stuðulsumsitingin skal skipast við faknevndum og ráðgevum. Harumframt er uppskot til at broyta ”leiklist” til tað breiðari og meiri fevnandi heitið ”palllist”. Eisini er ætlanin at áseta, at varalimir skulu vera í Leiklistaráðnum.

Ætlanin við uppskotinum var ikki at gera eina heilt nýggja lóg og taka onnur viðurskifti við í hesum umfari. Til tess krevst ein longri viðgerð við fleiri hoyringarumførum. Stjórnarráðið hevur fyri fáum árum síðan roynt at endurskoða lógina í síni heild, men tað rakk ikki á mál vegna ov nógvar ósemjur. Ein nýggj roynd at endurskoða lógina kann sjálvsagt verða gjørd aftur seinni.

Palllistafelag Føroya

Pallistafelag Føroya tekur undir við ætlanini at flyta stuðulin til yrkispalllist til Mentanargrunn Landsins at umsita. Skipanin við einari faknevnd fyri palllist, við tveimum ráðgevum við formligum førleikum og viðkomandi fakligum royndum, frá ávíkavist Palllistafelag Føroya og Leikarafelag Føroya, er skilagóð, heldur felagið.

Palllistafelagið heldur, at hetta kann tryggja, at metingarnar undir tilmælunum til nevndina hjá Mentanargrunni Landsins verða fjølbroyttar og fakliga væl grundaðar, og at tey palllistarligu dygdareyðkennini fáa ta raðfesting, tey hava uppiborið.

Harafturat heldur felagið, at henda nýskipan eisini yvirskipað er við til at fevna betur og breiðari allar teir listarligu tættirnar, sum við tíðini hava ment palllistarliga umhvørvið í Føroyum. Fleiri nýggj palllistafólk við nýggjum spennandi útbúgvingum innan eitt nú dans og sang, tónleik og sjónleik eru løgst afturat seinnu árini og hava latið upp fyri nýggjum formatum og nýggjum upplivingum innan føroyska palllist. Skulu framførslu-umhvørvið og føroyska áskoðarafjøldin fáa gleði og gagn av hesum nýggju føroysku palllistafólkunum, krevjast góðir palllistarligir stuðulskarmar og -skipanir sum megna at lofta teirra førleikum og menna teirra møguleikar.

Palllistafelag Føroya fegnast serliga um ætlaðu broytingarnar av orðingum í lógini, sum konsekvent breiðka smala hugtakið "leiklist" (skuespilkunst) til tað breitt fevnandi hugtakið "palllist" (scenekunst). Felagið heldur, at hesar broytingar eru upplagdar og skapa ein meira rættvísandi samanhang millum sjálvan lógartekstin, upprunaliga andan í lóg um Tjóðpall Føroya, og endamál og virksemi hjá Tjóðpalli Føroya sambært lógini og hennara viðmerkingar.

Eftir felagsins tykki fer henda skipan, og hesin hugburður, eisini sum frá líður, at virka fyri betri fakligari breidd og størri listarligari dygd innan føroyska palllist sum heild. Við at fagna fjølbroytninum í pall-yrkisliga umhvørvinum, kann føroyska palllistin myndast og mennast í framtíðini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur, at viðmerkingarnar hjá Palllistafelagnum taka væl saman um ætlanirnar við lógaruppskotinum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður, at Mentanargrunnur Landsins fer at hava tørv á øktari umsiting til starvsfólk og at samsýna ráðgevunum, ið skulu meta um verkætlanirnar. Tí verður játtanin hækkað við 300 tús. kr. í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026. Sum er, starvast 1,25 ársverk dagliga í Mentanargrunninum, og tískil er pláss fyri meiri umsitingarligari orku. Helst verður minni av fundarvirksemi í Leiklistaráðnum, tá ið stuðulin til yrkisleiklist verður fluttur, so tískil er helst ein sparing har.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyri landið hevur uppskotið tær umsitingarligu avleiðingar, at landsstýrisfólkið og umsitingin hjá landsstýrisfólkinum ikki skulu viðgera tilmæli frá Leiklistaráðnum um stuðul til yrkisleiklist. Leiklistaráðið fær betri stundir at virka sum stýri og arbeiða við at menna Tjóðpallin, meðan tað verður meiri umsiting hjá Mentanargrunninum. Mentanargrunnurin hevur eina fakskipan og eina journalskipan, ið ger tað lættari at umsita enn hjá Leiklistaráðnum, eins og tað verður lættari hjá umsøkjarum at søkja talgilt.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið verður mett at hava jaligar avleiðingar fyri fríyrkisbólkarnar, tí tað verður lættari at søkja umvegis fakskipanina hjá Mentanargrunninum, eins og armslongd verður tryggjað í mun til politisku skipanina.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at uppskotið er fevnt av nøkrum millumtjóðasáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

3) Hoyvíkssáttmálin
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri EMRS.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur heimildina at taka avgerðir um yrkisleiklist, í framtíðini nevnt yrkispalllist, til Mentanargrunn Landsins.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til nr. 1
Broytingin broytir heitið á løgtingslógini.

Til nr. 2 og 3
Broytingin broytir heitið "landsstýrismaður" og bendingar av tí til "landsstýrisfólk" og bendingar av tí.

Til nr. 4
Broytingin broytir yvirskiftina "Leiklistaráðið" til "Palllistaráðið".

Til nr. 5, 7, 9, 12 og 13
Broytingin broytir heitið "leiklistaráð" til "palllistaráð" og bendingar av tí.

Til nr. 6
Ásetingin tryggjar, at tað eisini verða tilnevndir varalimir í Palllistaráðið.

Til nr. 8
Fær ráðslimur forfall, kemur varalimur í hansara stað. Er talan um varandi umstøður, sum gera, at vanligi limurin ikki møtir, má nýggjur limur tilmælast. Forfall er at meta sum ein fyribils umstøða, ið ger, at vanligur limur ikki fær møtt.

Til nr. 11
Av tí at ásetingin ásetti, at Leiklistaráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um stuðul til yrkisleiklist, og at uppgávan frameftir verður flutt til Mentanargrunn Landsins, verður § 4, stk. 4 strikað.

Til nr. 10 og 15
Broytingin broytir orðið "leiklistaligum" til palllistaligum.

Til nr. 14
Broytingin broytir heitið "leiklist" til "palllist".

Til nr. 16
Broytingin broytir heitið "áhugaleiklistina" til "áhugapalllistina".

Til nr. 17
Broytingin broytir yvirskriftina "Stuðul til áhugaleiklist" til "Stuðul til áhugapalllist".

Til nr. 18
Broytingin broytir orðið "landsstýrismanninum" til "landsstýrisfólkinum", og ásetingin broytir orðið "áhugaleiklist" til "áhugapalllist".

Til nr. 19
Ásetingin broytir orðið "leiklistavirksemi" til "palllistavirksemi".

Til nr. 20
Broytingin broytir heitið “áhugaleiklist” til “áhugapalllist”.

Til nr. 21
Broytingin broytir yvirskiftina “Stuðul til yrkisleiklist” til “Stuðul til yrkispalllist”.

Til nr. 22
Mentanargrunnurin kemur í staðið hjá landsstýrisfólkinum. Tó skal Mentanargrunnurin tryggja sær, at avgerðirnar byggja á viðkomandi fakligar førleikar, og tískil verður skotið upp, at avgerðirnar hjá Mentanargrunninum um stuðul til yrkispalllist verða tiknar eftir tilmæli frá tveimum ráðgevum, ið Mentanargrunnurin tilnevnir eftir tilmæli frá faknevndini fyri palllist. Ráðgevararnir skulu hava formligar førleikar og viðkomandi royndir innan palllist í breiðari merking, tað veri seg innan sjónleik, leikstjórn, dans, opera o.s.fr. Tíðaravmarkingin verður sett inn, so at nýggj eygu koma á málini, og samstundis kann tann ráðgevin, ið hevur sitið longst, seta tann nýggjara inn í málini og mannagongdirnar. Á tann hátt tryggjast kontinuitetur og útskifting í senn.

Til nr. 23
Nýggj yvirskrift.

Til nr. 24
Skotið verður upp, at áður galdandi § 12 verður broytt. Galdandi áseting ásetir, at Leiklistaráðið ger uppskot til fíggjarætlan fyri stuðli til yrkisleiklist komandi fíggjarár at senda landsstýrismanninum innan 1. mai árið fyri ætlanarárið. Ásetingin gevur einki høpi longur, tí virksemið verður flutt til Mentanargrunn Landsins, so at gamla Leiklistaráðið fyri Tjóðpallin fer einki at hava við stuðulin til yrkisleiklist at gera longur. Harumframt skal Mentanargrunnur Landsins, eins og allir aðrir stovnar, gera frágreiðingar um sítt virksemi í sambandi við fíggjarlóg, og tískil er talan um lóggávu, ið er fevnd av øðrum reglum. Av tí sama verður skotið upp, at galdandi § 12 verður strikað og orðað av nýggjum.

Nýggja § 12 er ein áseting um, at Mentanargrunnur Landsins skal seta faknevnd fyri palllist at meta um stuðul til yrkispalllist. Hetta er fyri at tryggja fakligan førleika í metingini. Sami leistur verður brúktur til filmsstuðulin. Faknevndin skal saman við Mentanargrunninum og ráðgevunum sambært § 11 eftirmeta hvørt umsóknarumfar, t.e. at viðgera umfarið, hvussu tað gekst við at fáa upplýsingar til vegar, hví komið var til ávísu upphæddirnar, og hvat serligur dentur varð lagdur á v.m.

Til § 2
Stk. 1 er vanlig gildiskomuáseting.
Stk. 2 er ein skiftisregla, har umsóknir um stuðul til yrkisleiklist fyri 2026 verða viðgjørdar eftir galdandi reglum, tó so at tilmæli frá Palllistaráðnum (fyrr: Leiklistaráðnum), verða latin Mentanargrunni Landsins heldur enn landsstýrisfólkinum til støðutakan. Hetta skyldast, at væntast kann ikki, at faknevnd og ráðgevarar eru komin upp á plass beinanvegin, tá ið lógin kemur í gildi, og tað hevur vanliga skund at fáa málini avgreidd, so at verkætlanirnar kunnu koma í gongd. Skuldi Mentanargrunnurin komið til ta niðurstøðu, at tørvur er á fleiri umførum í 2026, eitt nú tí at avlop er eftir á játtanini, verður tað viðgjørt sambært reglunum í hesi lóg, t.e. við faknevnd og ráðgevum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 2. desember 2025

Sirið Stenberg
Landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Løgmansskrivstovan
Fylgiskjal 3: Umhvørvismálaráðið
Fylgiskjal 4: Heilsumálaráðið
Fylgiskjal 5: Leiklistaráðið
Fylgiskjal 6: Leikarafelag Føroya
Fylgiskjal 7: Pallistafelag Føroya
Fylgiskjal 8: Ria Tórgarð